***Hósdagin 21. september***
kl. 10.00-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00 »Lesibólkur«.
kl. 14.00-16.00 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
***Fríggjadagin 22. september***
kl. 10.00-12.00 Vælgerandi handverksætlan á loftinum. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 12.00-17.00 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Dagtilhaldið er opið hvønn týsdag og hósdag frá 15-18.

**Eldrafelagið Kumlá á Skála**
hevur hugnaløtu í húsum felagsins týskvøldið 19. sept. kl. 19.00.

**Tilhaldið á Toftum**
*Tlf. 448690*
*Vit halda til í niðaru hædd á Vesturskin.*
*Teldupost: tilhaldnes@post.fo*
Opið er týsdag, mikudag og hósdag. Frá kl. 15.00 – 18,00
***Tilhaldið fer í summarfrí og byrjar aftur í september. Lýst verður nærri.***
*Vit hava hvønn dag ein góðan drekkamunn, eins og vit hava nógv spøl, og annað ítriv.*
*Vit ynskja at øll kenna seg væl og hugnað sær.*

**Dagtilhaldið Fløvi**
***Vegna tekniskt brek í Kvinnufelagshúsinum, er dagtilhaldið fyribils í húsinum hjá eldrafelagnum Nón.***
***Mikudagin 20. sept.***
Fimleikur
***Hósdagin 21. sept.***
Myndaveving v. Gretu Olsen.
***Fríggjadagin 22. sept.***
Opið hús.

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
Vit eru byrja. Opið týsdag, mikudag og hósdag frá kl. 15.00.
Mikudag ymiskt ítriv.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17. báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. eisini eru bløðini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Mikudagin 20. septembur***
Um viðrar royna vit gongustavarnar, annars fara vit at boccia.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag
kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag
kl. 9.30-17.30
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
***Mánadag***
Tilmeldan til døgurða týsdag áðrenn kl 17.00 á tlf. 459091
***Týsdag***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 bløðini verða lisin fyri sjónveikum
kl 12.00 Døgurði
***Mikudag***
kl. 13.30 Telda
***Hósdag***
kl. 10.00 fimleikur
kl. 11.00 telda
kl. 13.30 bløðini verða lisin fyri sjónveik
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*

*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Eldrafelagið Nón**
Í vetur koma vit saman til handaligt arbeiði hvønn týsdag frá kl. 15.00 til 18.00.

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Spælistovan í Margarinufabrikkini**
Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.

**Rúslinjan hjá Bláa Krossi**
er opin týsdag og hósdag frá kl. 19.00-21.00.
Tlf. 318586.

**Opin ACA-fundur Tinghúsvegur 37, Havn**
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktionellum, familjum). Leygardag kl. 11.00-12.00 á Tinghúsvegi 37 í Havn.

**AA-fundir í Havn**
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20. Sunnudag kl. 17.00. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
fundur er hvørt týskvøld kl. 21.00 í Havnaskrivstovuni í Runavík.

**Brúdleyp**
Fríggjadagin 22. september giftast á Dronninglund Slot Sólvá Jacobsen, Tórshavn og Walther Skræp úr Vodskov. Brúdleypsadr.: Dronninglund Slot, Slotsgade 8, 9330 Dronninglund.

Leygardagin 14. oktober kl. 15.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Hjørdis Sivertsen, Norðdepli og Brian Hansen, Kalundborg. Vælkomst verður kl. 21.00 á Hotel Norð. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum, kunnu siga frá á tlf. 452129 ella 211029 seinast 1. oktober.

Leygardagin 14 oktober kl.16 giftast í Sands kirkju Beinta Fríðbjørg Simonsen og Erling Guðlaugur Arnarson ættaður av Akranesi. Veitslan verður í Virkinum kl. 19 fyri innbodnum.

Tann 28. oktober kl. 14.00 giftast Jórun Kjærbo og Jens Bogi Josenius í Højnæskirken, Højnæsvej 60, 2610 Rødovre. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma til veitsluna um kvøldið, verða biðin um at siga frá á tlf. 316519 ella á tlf. +45 43424484 áðrenn tann 7. oktober 2006.

**70 ára føðingardagur**
23. september verður Rannvá Samuelsen, í Vági, 70 ár. Dagurin verður hildin inni á Bakka hjá Sunrid og Aksel. Opið hús frá kl. 19.00.

**75 ára føðingardagur**
Mikudagin tann 20. september verður Elly Isaksen, Tjørnuvík 75 ár. Dagurin verður hildin fríggjadagin tann 22. september hjá dóttrini í Streymnesi.

Tann 6. oktober verður Steingrím Samuelsen, Sevmýri, 75 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 7. oktober á Gistingarhúsinum í Øravík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða Steingrím við at koma, verða biðin at siga frá áðrenn 1. oktober á tlf. 371166.

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 2. oktober kunnu Dagmar og Tommy, Klaksvík, halda silvurbrúdleyp. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum kunnu siga frá á tlf. 456405 ella 584175 í seinasta lagi 20. september. Veitslan verður í Skálanum kl. 18.00.

STARVSLÝSING

# Búskaparfrøðingur til Landsverk

Landsverk fer at økja um tænastuna á fíggjardeildini, og søkja vit tí eftir einum búskaparfrøðingi at starvast á fíggjardeildini fulla tíð.

**Um Fíggjardeildina**
Fíggjardeildin hevur ábyrgd av at fyriskipa og samskipa tey fíggjarligu viðurskiftini á stovninum. Fíggjardeildin hevur eftirlitið við, at játtanirnar halda, ráðgevur leiðsluni og hinum deildunum á stovninum um innanhýsis fíggjarstýringina, og ger ymisk hagtalsyvirlit til stovnin og aðrar almennar myndugleikar. Harafturat umsitur Landsverk íløgur og viðlíkahaldsuppgávur fyri onnur ráð.

Fyri at økja um tænastuna fer stovnurin at menna samfelagsbúskaparligu útgreiningarnar í sambandi við íløgur og viðlíkahald og harumframt menna fíggjarstýringina í sambandi við verkætlanir og rakstrarætlanir. Tí søkja vit eftir einum búskaparfrøðingi, sum skal vera við til at menna hetta arbeiðsøkið uppaftur meira.

Á deildini starvast 5 fólk, og tú kemur at vísa beinleiðis til fíggjarleiðaran.

**Arbeiðsøkið**
Sum búskaparfrøðingur kemur tú at hava ábyrgdina av:
- at gera kost-/nyttu kanningar og frágreiðingar
- at vera við at menna fíggjarstýringina av stovnins inntøkufíggjaða virksemi
- at vera við at menna fíggjarstýringina av stovnsins verkætlanum og rakstarætlanum herundir gera disponeringsroknskapir
- at vera við at gera fíggjarlógararbeiðið fyri avvarðandi ráð

Tú kemur eisini at luttaka í øðrum arbeiðsuppgávum hjá deildini sum t.d. dagliga fíggjarliga eftirlitinum, hagtalsarbeiðnum og gerð av ársroknskapi.

**Førleikakrøv**
Vit sóknast eftir einum fólki við viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni, t.d. cand.polit, cand.merc. HD(R) ella líknandi.

Vit vilja røkka best møguligum úrslitum og vænta vit tí, at tú ert arbeiðssamur, dugnaligur og væl skipaður. Vit leggja stóran dent á góðar persónligar eginleikar, at tú arbeiðir sjálvstøðugt, er ein arbeiðsglaður viðleikari við góðum samstarvsevnum, og kann málbera teg væl skrivliga og munnliga.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til lv@lv.fo ella:

Landsverk
Postboks 78
FO-110 Tórshavn

og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 27. september 2006. Merkið umsóknina "Umsókn – Búskaparfrøðingur" og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Árant Andriasson, fíggjarleiðara, á 540 821 ella aa@lv.fo.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*